ATLANTIC AIRWAYS
SUMMARKAPPINGIN '09

**Stóra summarkappingin hjá Sosialinum**

Send inn og vinn nógvar flottar vinningar

Vika 25:
Leiðin til London

8 síður við spennandi tilfari um summar

# Stavanger Dómkirkja



Søgan sigur, at Stavanger Dómkirkja varð bygd í 1125, tá Sigurd Jorsalafarari gjørdi Stavanger til bispasæti. Tað var Reinald biskuppur av Winchester, ið hevði ábyrgdina av byggingini.

Kirkjan er bygd í anglonormanniskum stíli, allarhelst av enskum handverkarum. Skjútseingilin hjá kirkjuni er St Svithun, og annar armurin av honum skal vera ein av upprunaligu halgilutunum hjá kirkjuni.

Í 1272 herjaði ein eldur katedralin og eftir hetta, varð eitt nýtt kór bygt í gotiskum stíli.

Stavanger Dómkirkja er einasti norski katedralur frá miðøld, sum hevur varðveitt sína upprunaligu útsjónd og verið nýtt loypandi.

Kirkjan er samstundis hin elsta í Noregi og hevur frá tí hon varð bygd í 1125 og fram til reformatiónina verið sæti hjá biskuppum í katólsku kirkjuni.

Eftir at hava verið stýrd út Bergen nøkur ár, gjørdist kirkjan sæti fyri leiðaru í Lutheriansku kirkjuni í 1539. Í 1682 varð bispasæti flutt til Kristianshavn, men kirkjan gjørdist aftur dómkirkja hjá Norsku kirkjuni í 1925.

Dómkirkjan liggur mitt fyri í Stavanger við Breiavatnet fyri sunnan og torginum og Vaagen fyri norðan.

Býurin er vaksin upp kring kirkjuna, sum í dag verður roknað sum miðdepilin í Stavanger.



# Oljumuseumið

Eitt av mest vitjaðu støðunum, sum ikki er náttúruskapt, er helst oljumuseumið.

Hetta er eitt av mest kendu museuum í Noregi, og greiðir eitt nú frá norsku oljusøguni.

Museumið er sermerkt, bæði í útsjónd og í innihaldi. Til ber at síggja oljuboripallar frá teimum fyrstu primitivu til teir allarnýggjastu og mest modernaðu. Talan er í nógvum førum um flótandi hotell, sum eru samanbundin við framleiðslupallar.

Modell vísa, hvussu pallarnir eru festir í havbotnin við ílabandi, modell eru av oljuskipum.

Ein av mest sigandi lutunum á framsýningini er ein lítil partur av einum beini av Alexander L. Kielland, boriplatformurin, sum í mars 1980 koppaði í illveðri. Tað ber illa til at ímynda sær megina, sum hevur skrætt tumma tjúkka stálið, men vanlukkan varð veruleiki fyri hetta flótandi hotellið – eitt sonevnt flotel – og tað kostaði 123 fólkum lívið. 212 fólk vóru umborð á pallforminum, og av teimum bjargaðust bert 89.

Vit venda aftur til oljumuseumið í Stavanger í einum komandi blaði.


Melda teg til Club Atlantic og

VINN FERÐASEÐLAR



og fá sertilboð sendandi við telduposti

Øll, sum tekna seg, eru við í lutakasti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.

Melda til á: www.atlantic.fo

Tel 34 10 00 ATLANTIC AIRWAYS atlantic.fo